# s til familjuna

**Anja:**

*Klæðini hjá Anju:*
*- Kjóli: Rützou, 799 kr.*
*- Toppur: Benedikte Utzon, 305 kr.*
*- Belti: Price, 499 kr.*
*- Skógvar: Buffalo, 899 kr.*

*Hvussu dámar tær klæðini?*
Jú, mær dámar væl klæðini, men eg veit ikki rættiliga, um hetta er júst mín stílur.
*Kundi tú funnið uppá at keypt klæðini?*
Veit ikki heilt, um eg hevði keypt tað, men hatta er tó avgjørt eitt flott sett.
*Gongur tú høgt upp í móta?*
Ja, eitt sindur. Eg klæði meg ikki altíð í tað nýggjasta nýggja, men eg royni tó at fylgja við.
*Keypir tú vanliga jólastás til jóla?*
Ja, eg kann gott keypa klæðir til jóla, men so skal tað eisini vera soleiðis, at eg kann brúka tað aftur. Eg keypi t.d. ikki ein fínan kjóla, ið eg bert kann brúka á jólum. Eg kundi t.d. væl hugsað mær at farið og keypt onkran vakran niðurdeil og topp til jóla. Tað fái eg jú altíð brúkt aftur.
*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Veit ikki. Eg vil í øllum førum ikki hava klæðir frá nøkrum, tí tað vil eg fegin keypa sjálv. Men kanska eina fartelefon?





**Hallur:**

*Hallur í einum klædningi av merkinum Bertoni:*
*- Klædningur: Bertoni, 1999.95 kr*
*- Skjúrta: Erterna silverline, 699.95 kr*
*- Slips: Atlas design, 399.95 kr*
*- Skógvar: 4 you, 799 kr.*

*Hvussu dámar tær klæðini?*
Mær dámar tey rættiliga væl. Tey eru dámlig og vøkur.
*Kundi tú funnið uppá at keypt tey?*
Ja, tað kundi eg væl.
*Gongur tú høgt upp í móta?*
Nei, tað geri eg ikki.
*Keypir tú vanliga jólastás til jóla?*
Nei, tað er rættiliga av tilvild, nær eg keypi. Um eg keypi okkurt plagg, er tað, tí eg havi tørv á tí, og ikki tí tað eru jól.
*Hvussu við jólagávum, keypir tú klæðir o.t. í jólagávu til nakran?*
Nei, men eg havi allarhelst givið onkrum onkur klæðir í gávu, uttan eg veit av tí.
*Hvat ynskir tú tær sjálvur í jólagávu?*
Klæðir hevði verið fínt at fingið. Kundi kanska ynskt mær okkurt av tí, eg eri í beint nú - kanska serliga klædningin. Men so hevði tað verið ein heldur dýr jólagáva.

djørv og hevur hug til at royna nærum alt. Anja fær borið nógvar ymiskar og prýðiligar kjólar upp í hendurnar - onkur er við kamuflerandi vøkrum mynstri, annar við blómum og ein triði einlittur. Kjólin, ið Anju dámdi best, var ein sera snotiligur síður svartur kjóli, sí mynd.

Tá Anja var liðug við at royna klæðini, takkaðu vit fyri okkum og fóru út aftur í hugnaliga jólaveðrið.

### Harradeildin í Handilskjarnanum

Eftir vitjanina í Kjallaranum fara vit niðan aftur eftir Áarvegnum - niðan til handilsdepilin, Handilskjarnin, har Hallur skal finna sær stás. Í Handilskjarnanum fara vit við lyft upp á triðju hædd til harradeildina.

Hóast klokkan nú er 17, og nógv er at gera í harradeildini, tekur ein vælklæddur og fryntligur Sámal Joensen, deildarleiðari, ímóti okkum.

Við at hyggja okkum íkring í harradeildini í Handilskjarnanum síggja vit í stundini, at hetta er ein breiður handil, tá hugsað verður um aldur. Her eru klæði til heilt unga dreingin, fara vit longur inn í handilin, flyta vit okkum upp í 20'uni - og ja, í roynd og veru heilt upp til abbarnar: "Vit royna altíð at hava klæði til allar aldursbólkarnar - og altíð við lekrum frískum litum. Tað skal vera nakað gott fyri eygað at skoða," sigur Sámal Joensen við einum brosi.

Sámal velur Halli ein vakran klædning og eina dámliga skjúrtu í litinum lilla: "Hjá monnum er 80'ara liturin lilla tann heilt stóri liturin júst nú. Ljósareytt, ið leingi hevur verið frammi, er ikki heilt farin burtur enn. Og eisini er liturin mintgrønt væl dámdur. Hjá ungu kallunum eru litirnir kanska heldur sterkari - sterkt grønt, reytt ella ljósareytt. Hesir litirnir eru serliga væl dámdir, tá hugsað verður um skjúrtur. Harrar keypa í heila tikið mest klædningar, skjúrtur og slips til jólastásið. Og tað má endiliga ikki bara vera tann vanliga samansetingin t.d. við hvítari skjúrtu, svørtum slipsi osfr. - einki vanabundið," leggur Sámal afturat, meðan hann í skundi finnur røttu støddirnar til Hall.

Klæðini hóska sera væl til Hall, ið nú er klárur til at fara til jóladøgurðan.

--

Nú øll familjan er vælklødd, fer Anna Elisabeth at gremja seg, tí hon er svong. Vit avgera tískil at takka fyri okkum og fara væl nøgd heim úr býnum.

### Móti júst í løtuni

Handlarnir, ið vit vitjaðu, vóru á einum máli um, at mótin júst í løtuni spennir rættiliga víða. - Bæði tann ráði og romantiski stílurin eru frammi, og tað er "in" at nýta máttmiklar litir í klædnasamansetingini. Men tó verður svart eisini nógv selt. Tað er jú altíð eitt "hit".

Meðan flestu harrarnir keypa sær klædning, skjúrtu og slips til jóla, ognar kvinnan sær oftast kjóla, fínan topp ella niðurdeil til jólastásið.

Tann ráði og romantiski stílurin, ið tey vaksnu klæða seg í, sæst eisini aftur í barnaklæðum, har klæðini somuleiðis skulu vera litrík. Til dreingir keypa tey flestu ráðar kovboybuksur og kanska eina skjúrtu til, meðan genturnar, eins og kvinnurnar, heldur vilja sleppa í kjóla ella niðurdeil.

### Hvør avger rákið?

Sum heild eru tað helst stóru mótahúsini og mótaskapararnir, ið avgera rákið í klædnamótanum, t.d. Dolce Cabbana, Versace, Gucci o.s.fr. Hesi hava dirvi til at royna tingini ann, og so fylgja hini eftir.

Hjá kvinnum eru tað ofta navnframar sjónleikarakvinnur ella modellir, sum t. d. Deanne Miller, Kate Moss, ið avgerða klædnarákið.

Hjá børnum eru tað helst tey, ið eru frammi í miðlunum - t.d. Britney Spears o. s. fr. Men um tey smáu børnini hava eldri systkin, vilja tey ofta hava somu klæðini sum tey, tí tey síggja upp til tey vaksnu.

### Jólini selja mest

Einki kann metast við søluna av klæðum í jólamánaðinum. Desembur mánaður er avgjørt árstíðin, har flest keypa sær stás, tí øll ynskja at lata seg í fín klæði á jólum. Og hetta er eisini tann mánaðurin, ið gevur handlum mest vunna upphædd. Um 1/3 av øllum, handlar selja í eitt heilt ár, verður selt bert í desembur mánaði. Og serliga er dagurin 23. desembur størsti søludagurin á árinum.

Hóast nógv keypa sær jólastás, ynskja tey flestu at keypa klæðir, ið tey eisini kunnu nýta aftur seinni og tískil ikki einans á jólum. Men hóast hetta kunnu klæðini gott vera dýr. Tey ungu tykjast tó at hava fitt av peningi, tí í mun til tey eitt sindur eldru keypa tey kanska eitt heilt sett, bert til ein ávísan jólafrokost/-jóladøgurða.


